# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skilagott tilmæli um Múrin

Nú er langt um leingi komið uppskot um varðveiting av Kirkjubømúrinum á borðið. Vit hava nú bíðað leingi um enn ikki við spenningi, tí Múrurin jú sambært galdandi lóggávu er friðað fornminni og sum friðað fornminni skal hann jú varðveitast óbroyttur fyri eftirtíðina. Tað hevur tí ikki verið ilt at gita sær til, hvat tilmælið fór at verða.

Landsstýriskvinnan í mentamálum upplýsir í tíðindaskrivi, hvat Múrnevndin og Føroya Fornminnissavn hava arbeitt við í felag. Hetta er bæði eins sjálvsagt og hetta er jaligt, eftirsum at Fornminnissavnið jú er viðkomandi fakligi myndugleiki í fornminnamálum. Tá ein serstøk nevnd á sinni varð sett at koma við varðveitingaruppskoti um Múrin, so kann orsøkin hugsast at hava verið hon, at Múrurin seinastu hundrað árini ikki bert hevur verið ein fornfrøðiligur spurningur men eisini ein politiskur trupulleiki fyri myndugleikarnar. Hetta tí Múrurin hevur so ómetaliga stóran týdning sum ímynd og fyri okkara samleika sum tjóð.

Tað var tí helst neyðugt fyri at finna eina forsvarliga loysn at leggja trupulleikan til eina nevnd, sum so hevur havt tann trupla setning at finna ein nýtiliga loysn á einum eymum máli. Nevndin hevur havt hepna hond og er samd um eitt tilmæli, sum er fakliga forsvarligt og politiskt nøktandi. Niðurstøðan hjá Múrnevndini er, at Kirkjubømúrurin eigur at verða varðveittur, sum hann er. Tey sakkønu um øll Norðurlond fegnast um hesa niðurstøðu, tí Múrurin er ikki bert føroyskur mentanararvur. Hann er eisini felags norðurlendskur og europeiskur mentanararvur. Sum fornminni er Múrurin unikur og víða gitin eitt nú tí, at hann sum heild hevur fingið frið og ikki er broyttur og umbygdur sum flest onnur líknandi fornminni í heiminum.

Nevndin mælir sjálvandi til, at verndararbeiðið fer fram eftir altjóða etiskum leiðreglum, og at arbeitt verður fram ímóti, at mentanarminnini í Kirkjubø sum ein heild, t.e. eisini aðrar leivdir av biskupssetrinum, verða góðkend sum partur av heimsins felags mentanararvi. Hetta er ikki bert eitt sera gott hugskot – hetta bindur eisini myndugleikarnar til at halda Múrin og hini mentanarminnini í umhvørinum sum tey eru í dag.

Nú er so eingin umbering fyri at bíða við at fara undir varðveitingar- og verndararbeiðið. Nevndin hevur áhugaverd uppskot í hesum høpi. Hetta verður ein dýr verkætlan, men Múrurin er so sermerktur og hevur so stóran mentanarligan týdning eisini uttan fyri landoddarnar, at tað verður neyvan nakar trupulleiki at útvega fígging uttanlanda til verkætlanina. Men hetta krevur sjálvsagt, at vit samstundis rinda okkara part og væl tað. Og hetta krevur, at vit eru samd.

Múrnevndin leggur nú frá sær og mælir til, at arbeiðið við Múrinum verður lagt upp í hendurnar á Føroya Fornminnissavni burturav. Hetta tilmælið er eins sjálvsagt, og tað er skilagott. Nevndin og Fornminnissavnið hava gjørt eitt gott arbeiði og nú er tað upp til politikararnar at skapa karmarnar og at gera tað møguligt at koma víðari.

**Sosialurin**

## Opið bræv til føroyinga



**GEIR H. HAARDE**
forsætisráðharri Íslands

Versta fíggjarkreppa í mong áratíggju fer nú um heimin og lítast má langt aftur í søguna til at finna samsvarandi tilburðir.

Avleiðingar av kreppuni raka Ísland harðari enn flestonnur lond. At tríggir einskildir bankar rendu seg fastar, hevur gjørt Íslandi stóran fíggjarligan skaða. Undir hesum truplu umstøðum noyddist íslendska stjórnin at leita sær hjálp hjá altjóða stovnum og vinartjóðum. Tað varð gjørt við teirri føstu ætlan at endurreisa fíggjarkervið í landinum, at gera manngarð um vælferðarskipanina og aðrar undirstøður samfelagsins og at standa við skuldbindingar okkara mótvegis øðrum londum, soleiðis sum vit altíð hava gjørt.

Tá ið íslendingar hava verið fyri náttúruvanlukkum, eittnú í sambandi við eldgosið í Vestmannaoyggjum 1973, hava mangar vinartjóðir verið fyrimyndarliga skjótar at veita okkum góða hjálp, og somuleiðis hava vit sjálv eisini eftir førimuni roynt at rætta øðrum hjálparhond, tá ið hart leikaði á.

Nú, ið mannelvt hóttafall er komið á okkum, er tað hugaligt at vita sær, at stuðulin ikki er minni enn áður. Fíggjarkreppa er um heimin allan, og íslendingar vita sjálvsagt væl, at trupulleikar eru aðrastaðni enn hjá okkum, og gera sær eisini púra greitt, at myndugleikarnir í einum og hvørjum landi fyrst og fremst hava skyldu til at hugsa um áhugamálini og trygdina hjá sínum egnu borgarum. Íslendingar eru tískil enn meira takksamir fyri ta hjálpsemi, ið vinartjóðir sýna, og slík hjálpsemi gevur harafturat vón um, at breið samstøða fæst um at loysa heimskreppuna.

Eingin ábyrgdarfull stjórn fer at læna himinháar upphæddir uttan orsøk, serliga ikki tá ið tað umsíðir hevur eydnast at gera ríkiskassan at kalla skuldarleysan, men tað slapst tíverri ikki undan at biðja um lán. Lánveiting frá altjóða stovnum og vinartjóðum ger tað møguligt hjá okkum at fara undir endurreisingararbeiðið og veldur, at vit koma skjótari uppundanaftur. Umframt Altjóða Gjaldoyrisgrunnin, har Ísland hevur verið limur síðani 1946, ætla Føroyar, Pólland, Noreg, Danmørk, Finnland, Svøríki og Russland at læna Íslandi pening, og harafturat er hugsandi, at Evropiska Samveldið (ES) fer at taka lut í hesum felagsátakinum hjá omanfyrinevndu pørtum. Eftir teirri tveyáraætlan, sum Ísland og Altjóða Gjaldoyrisgrunnurin hava lagt í felag, er ikki í umbúna at lata lánsfæið renna beinleiðis inn í íslendska búskapin. Tað skal heldur standa sum varagrunnur til at gera tað møguligt hjá Seðlabanka Íslands at fáa gjaldoyrismarknaðin í rættlag aftur, tí tað er ein fyritreyt fyri búskaparligum bata og endureising. Kortini er greitt, at við lánsfænum ber ikki til at tryggja óbroytta støðu í Íslandi, men hinvegin gevur tað íslendingum høvi til at gera neyðugar ábøtur á stjórnarskipanina og fíggjarkervið komandi mánaðirnar og árini.

Fallið hjá íslendsku bankunum var so brátt og stórt og avleiðingar av tí í Íslandi so ítøkiligar, at íslendingar eyðvitað stúra fyri framtíðini og altjóða støðu og framtíð landsins sum heild. Støðan er sera hættislig, men við miðvísum og skilagóðum átøkum hjá íslendskum myndugleikum, við samstøðu í fólkinum og moralskum, politiskum og fíggjarligum stuðli frá altjóða stovnum og vinartjóðum, eru útlit til, at hesin standurin bert verður fyribils. Fámentir og fátækir íslendingar stovnaðu sjálvstøðugt lýðveldi og stríddu seg fram til betri lívskor undir truplum umstøðum, og eftirkomarar teirra fara treyðugt so eisini at vinna á núverandi vandum. Ongar áneyðir eru at falla í fátt. Ísland hevur bæði gott fólk og náttúrutilfeingi, sum tryggja, at vælferðarsamfelagið framhaldandi kann útbyggjast, og lýðveldið kann røkja skyldur og njóta rættindi síni í heimssamfelagnum. Stjórnin hevur tískil sett sær fyri at leggja serligan dent á framsókna og burðardygga gagnnýting av tilfeinginum í sjónum og varandi orkukeldum við tí fyri at eyga at eggja til meiri nýskapan og fjølbroytni í íslendskum vinnulívi, so at íslendingar eisini í framtíðini kunnu brúka útbúgving sína og vitan til frama fyri komandi ættarlið.

Íslendingar hava altíð verið søguliga tilvitaðir. Eyðvitað kann slíkt tilvit viðhvørt villa fólk av leið og út í fortíðardýrkan, men oftari enn ikki ger søguligt tilvit tað lættari at seta samtíðina í størri samanhang. Íslendska fólkinum bilar ikki søguminni, og vinargerð í lagnustund verður seint gloymd.

## Rúsdrekkapolitikkur kringvarpsins



**SOFUS DEBES JOHANNESEN**

Nú hevur m.a. Kringvarp Føroya í fleiri dagar tosað um rúsdrekkatrupulleikar, og tí kundi tað verið áhugavert at fingið at vita, um hetta bert eru uttanhýsis trupulleikar.

Eg skal beinan vegin siga, at eg havi fleiri ferðir ferðast saman við umboðum fyri Kringvarpið, bæði útvarps- og sjónvarpspartin, og havi onki at havast at í tí sambandi. Havi fleiri ferðir hitt hesi starvsfólk í barrini eftir langan dag, uttan at nakað hevur verið at skrivað heim um, hvørki so ella so.

Men samstundis havi eg hoyrt frá øðrum ferðum hjá Kringvarpinum, har starvsfólk ikki hava kunna arbeitt orsaka av drykkjuskapi og enntá at dýr útgerð hjá stovninum (fyri fleiri hundrað túsund krónur) er farin fyri skeytið, uttan at nakað hevur verið at hoyrt um tað í Kringvarpinum.

Hinvegin havi eg hesa vikuna sæð D&V á netinum. Mánakvøldið vóru næstan 10 minuttir av stuttu tíðindasendingini nýttir upp á evnið og í kvøld aftur út við 4 minuttir.

Eg skal ikki taka dagar ímillum hendingarnar og leggja nakað sum helst í tær, men Ingolf og Kaj, tá hetta evnið er so áhugavert: Hvat við at kanna, hvussu nógv tílík mál hava kostað Kringvarpinum, uttan at orð ella eið hava verið grett um hetta?

Hetta hevði verið áhugavert at hoyrt frá tykkum, sum breggja tykkum av at vera so óheftar og rættvísar í øllum dagsins viðurskiftum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.